

> Móttøka

Í sambandi við, at vit eru flutt í nýggj høli, í kjallaranum á Hotel Runavík, Sjómansheiminum, bjóða vit til almenna móttøku mikudagin 18. mai kl. 15-18.

*Høvi verður eisini at síggja málningaframsýning við Meinhardi Hansen.*

KREA.FO · TEL 44 93 39

Blái Krossur Føroya

Heiðavegur 6 . 620 Runavík . Tel 470 700 . Faks 470 701 . blakross@blakross.fo . www.blakross.fo


# Betri úrslit hjá Tryggingarfelagnum Føroyar P/F



*Nevndin í Tryggingarfelagnum Føroyar var afturvald á aðalfundinum fríggjadagin. Ì henni sita: Trygvi F. Guttesen, Birgir Mohr, Durita Bjellvåg, Leif Ellingsgaard, Jógvan Lützen, Jan Müller, Ronald Poulsen, Emil Simonsen og Jákup Sólstein*

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tryggingarfelag Føroyar P/F kunngjørdi fríggjadagin ársroknskapin fyri 2004. Roknskapurin vísur eitt munandi betur úrslit av tryggingarvirkseminum, enn árið fyri.

Hóast útgjaldið fyri skaðar er 13 milliónir størri í 2004 enn 2003, er avlopið av tryggingarvirkseminum 7,5 milliónir. Hetta er sambært Tryggingarfelagnum Føroyar P/F nøktandi.

Gunnar í Liða, forstjóri sigur, at avlopið fyrst og fremst kemur av betri endurtryggingum. Ella við øðrum orðum, at skaðarnir vóru av sovorðnum slag, at meiri fekst aftur í endurtryggingini. Men eisini tryggingargjøldini fóru eitt vet upp, úr 274,2 milliónum til 274,9 milliónir.

Samlaða úrslitið hjá Tryggingarfelagnum Føroyar P/F áðrenn skatt gjørdist 24,4 milliónir.

Tryggingarfelagið Føroyar P/F er partur av Tryggingarkoncernini, sum umframt felagið er móðurfelag hjá m.ø. TF Holding P/F.

Samlaða eginognin í konsernini er nærum 1,3 milliardir, og samlaða úrslitið fyri koncernina í 2004 varð áðrenn skatt 71,9 milliónir. Hetta er ein vøkstur við 27,8 milliónir í mun til 2003. Koncernin metir, at hetta er nøktandi undir teimum fortreytum, ið vóru galdandi í 2004.

Á aðalfundinum í Tryggingarfelagnum, varð øll nevndin afturvald.

Í nevndini sita, Trygvi F. Guttesen, Birgir Mohr, Durita Bjellvåg, Leif Ellingsgaard, Jógvan Lützen, Jan Müller, Ronald Poulsen, Emil Simonsen og Jákup Sólstein.


COROLLA 25

TOYOTA




## Corolla 25
## - Toyota og Reyni Service í 25 ár

Til at hátíðarhalda tey 25 árini, bjóðar Reyni Service eitt serstakt føðingardagssnið av Toyota Corolla. Sniðið hevur heitið Corolla 25 og er útgjørt við hóskandi eykaútgerð, sum ger bilin til nakað heilt serligt.

**Tilboðið er galdandi frá leygardegnum 14. mai og so leingi Corolla 25 er á goymslu.**

Toyota Corolla 25 fæst fyri **kr. 198.000,-**

**Corolla 25 er útgjørdur við hesi eykaútgerð:** Gáttir á síðunum og pyntilistar aftan, tokulyktir, aircondition, alu-felgur, leðurróður við fjarstýring til radio, gearknøtt úr leðri við chromi og "Luna"-inntrekk, tó standard frontgrill og kúfangari.

Corolla 25 kostar kr. 210.000,-, um bilur er í býti.

TEAM85

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F